gult20 cyan20 magenta20 svart20



Óli Hammer, stjóri á Smyril Line:

# Roknar við at fara úr nevndini

**– Eg eri ikki keddur um at fara úr nevndini. Eg vóni bara, at skilafólk verður valt í nevndina, sigur Óli Hammer, sum væntar at halda fram sum stjóri**

SMYRIL LINE
*Eyðun Klakstein*

Fyrst í juni mánaði verður væntandi eykaaðalfundur í Smyril Line, har nevndarval verður á skránni.

Tað verður roknað við, at nevndin verður nógv broytt.

Ein av teimum, sum hevur sitið í nevndini øll árini og sum var við at stovna felagið, er Óli Hammer. Hann roknar við, at hann fer úr nevndini, tá eykaaðalfundur verður í felagnum.



*– Tað koma nýggir pengar inn í felagið, og eg haldi tað er púra natúrligt, at hesi feløg vilja hava síni egnu umboð í nevndina, sigur Óli Hammer, stjóri og nevndarlimur í Smyril Line*

– Tað koma nýggir pengar inn í felagið, og eg haldi tað er púra natúrligt, at hesi feløg vilja hava síni egnu umboð í nevndina, sigur Óli Hammer.

Tú vart við til at stovna Smyril Line og hevur meiri enn nakar annar myndað felagið. Ert tú ikki keddur av at skula úr nevndini nú?

– Nei, tað eri eg als ikki. Eg eri heldur fegin um tað, tí eg havi nóg mikið at gera sum stjóri. Vit koma at hava ein lítla milliard í umsetningi, og tí er ivaleyst at verða stjóri fyri, sigur Óli Hammer, sum roknar við nógvum uppgávum sum stjóri framyvir.

### Helst minni nevnd

Smyril Line hevur seinasta hálva árið verið í fíggjarligum vandasjógvi, men støðan í felagnum tykist verða komin í rættlag aftur.

Nýggj feløg og grunnar hava gjørt íløgur í Smyril Line, og hetta skal tryggja, at byggingin av nýggja ferðamannaskipinum kann halda fram sum ætlað.

Men nýggju innskjótararnir vilja eisini hava ávirkan á felagið, sum teir hava sett nógvar pengar í.

Roknað verður við, at nýggj nevnd verður vald í Smyril Line, og tað er eisini sannlíkt, at nevndin verður minni. Í løtuni telur hon sjey fólk.

– Eg kenni einki til, hvat ætlanin er við nevndini, men tað er rættiliga sannlíkt, at nýggj nevnd verður vald, og eg vóni bara, at tað verða skilafólk, sum koma í nevndina, sigur Óli Hammer.

– Tað koma nýggir pengar í felagið, og tað eru teir, sum nú skulu taka avgerðirnar.

15. mai er settur sum evstamark fyri at fáa øll viðurskifti í felagnum uppá pláss. Síðani verður kallað inn til eykaaðalfund, og hesin fundur verður helst fyrst í juni mánaði.

## SL vil hava trygd fyri trygdini



*Trygdin og mannagongdir umborð á øllum strandfaraskipum skal kannast*

**Strandfaraskip Landsins vilja hava Skipaeftirlitið at kanna trygdina umborð á øllum strandfaraskipum**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Strandfaraskip Landsins taka atfinningar ímóti trygdini umborð á strandfaraskipum í stórum álvara, og tí fer stovnurin nú at biðja Skipaeftirlitið kanna trygdina umborð á øllum strandfaraskipum.

Hetta sigur Strandferðslan seg gera, eftir at løgtingskvinnan, Rúna Sivertsen, hevur reist ivaspurningar um viðurskiftini umborð á Dúgvuni.

Strandferðslan sigur seg verða undir strongum eftirliti av Skipaeftirlitinum og lýkur øll altjóða krøv um tryggan rakstur av ferðamannaskipum, men hóast hetta verða framhaldandi ivaspurningar reistir um trygdina.

### Alt skal kannast

– Hvørki ferðafólk, Strandferðslan ella Skipaeftirlitið kunnu liva við, at ivaspurningar verða reistir um trygdina umborð á skipunum, sigur Strandferðslan á heimasíðu sínari.

Strandfaraskip Landsins ætla at fáa Skipaeftirlitið at kanna allar trygdarmannagongdir umborð á strandfaraskipunum. Um tað er neyðugt, skulu mannagongdir broytast.

Skipaeftirlitið skal eisini vísa á møguleikar fyri um- ella útbygging á landi ella umborð, og kemur eftirlitið fram á annað av týdningi, skal tað eisini takast við.

## Atlantis-stýrið er mannað

**Øll trý fólkini, sum skulu mynda stýrið í sjálvsognarstovninum Atlantis, er nú vald**

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nú er greitt, hvørji tey trý fólkini, sum skulu sita í stýrinum fyri mentanarhúsið Atlantis, skulu verða.

Borgarstjórin í Klaksvík, Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Norðoya Sparikassi skulu velja hvør sín lim í stýrinum, og tað hava tey nú gjørt.

Borgarstjórin valdi Nikolinu Olsen, sum eisini verður forkvinna í stýrinum. Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur biðið Jógvan Ravnsfjall, savnsvørð, umboða seg í nevndini, og Norðoya Sparikassi hevur valt Súsannu Olsen í nevndini.



*Stýrið fyri mentanarhúsið Atlantis er nú valt og klárt er at seta gongd á virksemið í húsinum aftur*

Tað verða sostatt tvey konufólk og ein maður, sum fara at hava ábyrgdina av virkseminum í Atlantis.

### Møguligur leiðari

Tað verður nú upp til stýrið at gera av, hvussu virksemið í Atlantis skal skipast og um nakar leiðari skal setast fyri húsið.

Ætlanin hevur ongantíð verið, at stýrið skuldi hava dagligu umsitingina av húsinum, og tí er sannlíkt, at stýrið fer at seta ein persón at hava dagligu leiðsluna av húsinum.

Tað er lagt upp til, at biografur skal verða í Atlantis. Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur innivist har, og harafturat var upprunaliga hugsanin við Atlantis, at húsið skuldi hýsa alskyns mentanartiltøkum.

Atlantis varð umbygt fyri næstan tríggjar milliónir krónur í 1997, men neyðugt er við onkrum smávegis ábøtum í húsinum.

## Scania hesa vikuna afturat

**Dúgvan verður ikki klár at fara í sigling fyrr enn hendan vikan er av**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*



Strandfaraskipið Dúgvan fór ikki aftur í sigling í gjár, soleiðis sum ætlanin annars hevði verið. Arbeiðið tekur nakrar dagar afturat, og tí verður Dúgvan ikki klár fyrr enn hendan vikan er av.

Estlendska avloysaraferjan, Scania, heldur tí fram við siglingin millum Klaksvík og Fuglafjørð, sum ferjan hevur røkt síðani páskirnar.

Hóast summarferðaætlanin kom í gildi í gjár, ávirkar hetta ikki siglingina hjá Scaniu, sum siglir eftir serligari ferðaætlan.

Strandferðslan hevur leigað Scaniu fram til 11. mai, tá skipið aftur skal til Estlands.

gult21 cyan21 magenta21 svart21

ítróttur

Nr. 83 • mikudagur • 2. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

### Støðan, danska superligan

| | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCM | 26 | 13- 8 - 5 | 45 | 34 | 11 | 47 |
| 2 | Silkeborg | 26 | 12- 11 - 3 | 39 | 28 | 11 | 47 |
| 3 | Brøndby | 26 | 13- 6 - 7 | 59 | 34 | 25 | 45 |
| 4 | FCK | 26 | 11- 11 - 4 | 39 | 22 | 17 | 44 |
| 5 | Viborg | 26 | 12- 6 - 8 | 44 | 29 | 15 | 42 |
| 6 | Lyngby | 26 | 11- 5 -10 | 35 | 44 | -9 | 38 |
| 7 | OB | 26 | 10- 5 -11 | 39 | 35 | 4 | 35 |
| 8 | AaB | 26 | 8 - 10 - 8 | 39 | 38 | 1 | 34 |
| 9 | AGF | 26 | 9 - 4 -13 | 40 | 51 | -11 | 31 |
| 10 | AB | 26 | 5 - 12 - 9 | 32 | 33 | -1 | 27 |
| 11 | Herfølge | 26 | 5 - 8 -13 | 30 | 49 | -19 | 23 |
| 12 | HFK Sønderj. | 26 | 1 - 6 -19 | 25 | 69 | -44 | 9 |

## Todi varð kosin dagsins maður

**FCK var óheppið, tá sigursmálið hjá teimum í Silkeborg av órøttum varð kolldømt**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

FCK, sum ikki hevur tapt síðani tað varð farið at spæla aftur eftir vetrarsteðgin, er framvegis við í stríðnum um DM. Mánakvøldið vóru teir í Silkeborg. Úrslitið var 1–1, og tað hevur við sær, at FCM og Silkeborg hava 47 stig, Brøndby hevur 45 stig og FCK 44.

At tað endaði við javnleiki var at rokna við. Í níggju av seinastu tíggju dystunum ímillum hesi bæði feløgini hava tey fingið eitt stig í part. Men FCKarnir iðraðu seg, tá teir vendu nøsini heim eftir. Síðstu fimm minuttirnar vóru tvey mál hjá teimum kolldømd.

Sjónvarpsupptøkurnar vístu, at fyrra málið, sum varð kolldømt fyri rangstøðu, áttu teir at havt fingið. Thomas Thorninger stútaði upp á tvørs til Pascal Simpson, sum knappar tíggju minuttir undan dystarenda kom á vøllin fyri Toda Jónsson. Linjuverjin metta stóra mannin, sum skoraði úr fýra metra fjarstøðu, at vera rangstaddan, men upptøkurnar vístu, at hann var í hvussu so er ein hálvan metur røttu megin, tá avleveringin fall.

Hitt málið varð kolldømt, tí Pascal Simpson í yvirtíðini skuldi havt gjørt fríspark í sambandi við hornasparksstøðu.

### Heimaliðið omaná

Silkeborg var omaná í 1. hálvleiki. Tá hevði FCK lítið at bjóða upp á frammi á vøllinum. Sibusiso Zuma og Thomas Thorninger komu ongantíð ígjøgnum í borðunum. Harvið var Heine Fernandez, sum var tætt við at skora, tá hann við høvdinum sendi hornasparksinnlegg í tvørtræið, so at siga arbeiðsleysur.



*Todi var aftur í eyðkenda stílinum, tá FCK mánakvøldið leikti javnt á útivølli móti Silkeborg*

Todi Jónsson, sum á heimasíðuni hjá sær fríggjadagin helt, at honum enn restar eitt sindur í at koma heilt fyri seg eftir landsliðsskaðan í Luksemburg, vísti onkra ferðina síni evni, tá hann tamdi sera torførar bóltar, men sum oftast vendi hann skeiva vegin.

Silkeborg kom á odda eftir 22 minuttir. Thomas Thorninger kiksaði sending dygst uttanfyri brotsteigin, og Per Ottosen sendi úr høgru flatt framvið Thomas Myhre og í handara síðunetið.

### Todi eyðsýndur

Eftir steðgin tóktist heimaliðið eitt evarska lítið sindur verjukent. FCK fekk fatur á miðvøllinum, og Todi Jónsson, sum var við í nógvum, tóktist á ongan hátt at vera darvaður av vøddaskaðanum. Av hyggjarunum hjá TV3+ varð hann kosin besti maður á vøllinum, og í onkrum av bløðunum fekk hann hægsta karakterin, samstundis sum hann varð sagdur í 2. hálvleiki at hava gingið undan, verið aggressivur og pågående.

Todi javnaði sjey minuttir eftir steðgin. Donsku miðlarnir lýsa ta støðuna sum dagsins detalju. Eftir temjing fór Todi frá eftiransaranum, Boro Zivkovic, skar eitt sindur úr høgru og inn fyri málið, og tá nýggi landsliðsmálverjin, 35 ára gamli Peter Kjær, kom út ímóti var Todi nóg kaldur at senda framvið honum og dygst innanfyri nærra stólpan. Eitt fínt mál.

## Klaksvíkingar spæla í átta feløgum

**Umframt í KÍ, eru klaksvíkingar at síggja í sjey øðrum feløgum. Bæði her heima og uttanlands**

HAGTØL
*Ivan Eginsson*

KÍ hevur altíð verið eitt tað størsta og fremsta felagið í Føroyum. Nógvir fínir spælarar eru uppvaksnir í Klaksvík, men tey seinastu árini hevur gongdin verið tann, at fleiri av bóltsnillingum úr Norðoyggjum fara úr barndómsfelagnum og royna eydnuna aðrastaðni. Í dag eru átta upprunaligir klaksvíkingar at síggja í ikki færri enn sjey (!) øðrum feløgum í fremstu deildunum í Føroyum, Danmark og Noregi. (í Føroyum)

Føroyum
HB Allan Mørkøre, Rógvi Jacobsen
B36 Heðin á Lakjuni
B68 Arnold Joensen
EB/Streymur Gunnar á Steig

Danmark
FCK Todi Jónsson
Herfølge Jákup Mikkelsen

Noreg
Sogndal Kurt Mørkøre

Saman við fyrrverandi KÍ-leikarunum, póllendingunum Andrzej Pacek (B36) og Marek Vierzbicki (VB) kundu klaksvíkingarnir í útlegd næstan mannað eitt heilt fótbóltslið, ið ivaleyst hevði verið eitt upplagt evni til meistaraheitið í 1.deild. Eingin av hesum nevndu monnunum gleðir tó býarmenn sínar á einum fótbóltsvølli í 2001.

Hinvegin hevur felagið ongan føroyskan spælara í hópinum, ið er uppvaksin aðrastaðni enn í Klaksvík. Allir teir tólv føroyingarinir, ið vóru við í dystinum ímóti GÍ sunnudagin, hava sínar røtur í KÍ. Hinir

tveir eru jugoslavarnir, leikandi venjarin Tomislav Sivic og tann nýkomni Aleksander Djordjevic, sum spældi við fyri fyrstu ferð. Eitt annað felag í 1.deild, sum ongan føroyskan leikara hevur aðrastaðni frá, er FS Vágar. Vágamenn brúka tó tríggjar útlendingar á vøllinum, og ein afturat stendur fyri venjingini.





*Arnold Joensen, sum her sæst í dysti fyri B68, er ein av átta klaksvíkingunum, sum í ár royna seg uttan fyri barndómsfelagið*